# Táið blindur leiðir blindan, falla báðir í grøvina



EGIN HENRIKSEN

Miðflokkurin

Tá eg hoyrdi Sambandið, í rama álvara, tosa um at Føroyar skuldu innlimast í ES, og so varð alt gott, rann mær omanfyri nevndu orð í Matteus 15 til hugs.

Tað sær út til, at tað eru mong fólk, ið hava eitt blint álit á, at vælstandurin í ES fer at halda á til ævigar tíðir.

Tey, ið hugsa so, hava ikki fylgt væl við í søgutímunum í skúlanum.

Hvussu munnu ES-borgararnir fara at hava tað, tá ið niðurgongd og stríð fer at gera um seg ?

Skilur man ikki at tað, sum gongur fyri seg handan leiktjøldini, er at arbeitt verður við at skipa eitt stórveldi við egnum keisara og øllum, ið har hongur uppi í.

Umráðandi fyri Føroyar er, at navigera soleiðis, at vit kunnu sigla rundan um skerini og verða uttanveltað. Tað má ikki henda, at føroyskur ungdómur verður noyddur til at gera hertænastu í einum framtíðar ES-heri.

Fleiri av londunum, sum eru limir í ES, eru ikki har tí teimum dámar tað, men tí tey tora ikki at standa uttanfyri.

Undir 10 % av heimsins borgarum eru innan fyri ES-mørk, so tað má kunna bera til hjá okkum, at lívbjarga okkum og tað væl, uttanfyri ES.

Torførar tíðir standa fyri framman. Stýrast má við skili fyri ikki at koma út í óføri.

Miðflokkurin hevur eisini her eina greiða støðu. Føroyar skulu ikki innlimast í ES.

Vit vilja sum fræls friðarelskandi tjóð, samarbeiða við tjóðir, ið hava sama sýni.

Vel lista H.
Vel Miðflokkin.

”.. at bera tað merkið, sum eyðkennir verkið, ið varðveitir Føroyar,
mítt land! ”

# Jenis av Rana sigur medvitað ósatt



FINNUR HELMSDAL

Tjóðveldi

Jenis av Rana hevur undir valstríðum, bæði til fólkaog løgtingvalið, sagt ferð eftir ferð, at eg ynski at løggeva halgu bók og kristindómin út úr løgtinginum og føroyska samfelagnum. Jenis byggir hesar pástandir á, at eg í framsøgurøðu míni í samband við málið um 266B segði hetta. Tað eg segði í nevndu røðu var, at halga bók undir ongum umstøðum má gerast lógbók fyri løgtingið og løgtingsfólk. Tað, at halga bók er lógbók merkir einfalt, at so skulu vit løggeva og virkar bókstaviliga eftir tí, sum stendur í halgu bók. Í báðum testamentunum. Slíkt ynskja hvørki eg ella nakar annar í Tjóðveldi og valla nakað annað tingfólk heldur. Og als ikki Jenis av Rana sjálvur. Jenis veit útmerkað væl hvat eg segði og meinti, men hann velur medvitað at broyta og umtulka míni orð. Og hann fær sínar floksfelaga til at gera tað sama.

**Kristna siðalæran**

Kristna siðalæran er grundarlagið undir føroyska samfelagnum, tað er kristna siðalæran sum bindur okkum saman. Hon er tí eisini grundarlag undir øllum, sum fer fram á tingi. Soleiðis hevur tað verið, og soleiðis fer tað at verða. Men eg kann sjálvandi ikki góðtaka, at bíblian verður okkara lógbók.

**Hjúnabandið størsti trupulleikin**

Jenis og aðrir Miðflokkamenn hava eisini havt frægd av at fortelja Føroya fólki, at eg skal hava sagt frá tingsins røðarapalli, at hjúnabandið er størsti trupulleikin í okkara samfelag. Søgan er í stuttum tann, at Miðflokkurin í einum av lógaruppskotum sínum skrivaði, at hjúnabandið er kjarnan í føroyska samfelagnum. Hesa útsøgnina hugleiddi eg so yvir. Ein kjarna er ímyndin av stabiliteti og styrki, og kunnu vit sjálvsagt nýta kjarnuna sum ímyndina av tí fullkomna hjúnabandinum. Tað eru langt frá øll hjúnabond, sum eru eydnurík, ótrúskapur er als ikki ókent fyribrygdi, ein triðingur av hjúnabondunum detta sundur. Hvussu nógv børn og vaksins líða ikki undir mongu hjúnaskilnaðunum? Yvir 50% børnum okkara eru fødd uttan fyri hjúnalag. So hóast hjúnarlagið er eitt vælsignilsi fyri nógv, so er tað ein stórur trupulleiki fyri onnur. Eg mælti ikki til í tinginum, at hjúnabandið skuldi avtakast ella niðurgerast, men helt tað kanska var rættari at siga, at familjan er kjarnan í føroyska samfelagnum.

Men eisini í hesum hevur Miðflokkurin valt at káva seg undir óhugaligum dupultmorali, og hann velur at siga ósatt og manipulera, hetta fyri at skaða meg og Tjóðveldi.

Nú eri eg ikki “bíbliukønur”, men tað fyrikemur mær, at lýsingin, Jesus hevði av farisearum, hon passar rættiliga væl til teir, sum eru í Miðflokkinum. Teir eru sjálvforherligandi, teir peika eftir øðrum og teir himprast ikki við at døma onnur.

# Tá 8-16 ikki er nokk



NITA NÆS

Javnaðarflokkurin

Fleiri fólk hava tosað við meg um trupulleikar við at fáa dagligdagin at hanga saman.

Tvær inntøkur eru ikki nóg mikið til at gjalda hvørjum sítt!

Prísurin á olju, matvørum og øðrum neyðsynjarvørum hækkar. Húsprísurin í Havn er hækkaður so nógv, at bert fólk við sera høgum inntøkum kunnu seta búgv í har.Og fólk á bygd hava torført við at fáa húsarhaldið at mala runt

Samstundis so hoyra vit um met í mvg og skatti, og tey sum sita og stýra pengingarenslinum fortelja okkum, at framtíðar búskaparligu vónirnar eru góðar.

Alt í alt: Sum javnaðarfólk situr ein eftir við eini kenslu av einari mótsøgn: Tveir bólkar siga hvør sína søgu.

Eg haldi, at vit mangla fólk á ting, sum skulu stríðast fyri stóra bólkinum av føroyingum, sum ikki eiga pening at liva fyri, hóast tey arbeiða hvønn dag, gjalda skatt, eiga børn og leggja sítt til samfelagið.

Hesin bólkur av fólki er risastórur, tí vit vita, at alt fleiri føroyingar við sera høgari inntøku - liva tá alt kemur til alt - av rentustuðlinum til egnan bústað.

Verði eg vald vil eg gera alt tað, sum eg kann fyri at fáa greiðu á hesu fløkju!

# Greið melding um Studentaskúlan



RODMUNDUR NIELSEN

valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!

Í vinnulívinum eru vit dagliga noyddir at taka skjótar og avgjørdar avgerðir. Vit kunnu ikki lata eitt vinnutól upploysast av soppi. Studentaskúlamálið í høvuðsstaðnum skal loysast her og nú uttan nakað møsn, drál og tómgongdartos. Avgerðin skal takast seinast í 2008 um studentaskúlan soleiðis at skúlabygging kann byrja í 2009, her hvørki kann ella skal bíðast, her skal farast í gongd nú.

Tað er neyðugt at gera politiska semju um hvussu Studentarskúlin og HF skal loysast, soleiðis at øll kunnu síggja fram ímóti at hesin týðandi skúladepil í Suðurstreym kemur á eina kós, har tosið aftur kemur á innihaldið í skúlanum heldur enn um út av lagi niðuslitnar bygningar, sum ikki eru tíðarhóskandi. Vit tosa um ein klekingardepil av ungdómi til teirra framtíð.

# Valið snýr seg um felagsskapin



EDMUND JOENSEN

Sambandsflokkurin

Heimurin finnur í hesum døgum saman. Tvørtur um landamørk skulu vit øll royna at taka við felags avbjóðingum, so vit í seinasta enda standa sterkari.

Sambandsflokkurin hevur somu stevnu í Ríkisfelagsskapnum

“Onki land kann standa einsamalt”.

Hetta var høvuðsboðskapurin hjá fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton, í Føroyum í summar.

Hann sipaði m.a. til, at vit øll og tvørtur um landamørk skulu taka við felags avbjóðingum sum t.d. bardaganum móti sjúkum og fátækradømi, einum reinari klima, stríðið fyri friði og búskaparligari framgongd fyri øll.

Vit í Sambandsflokkinum eru samd við Bill Clinton. Tað er rættast, at allur heimurin finnur saman um størstu avbjóðingarnar.

Í flokkinum hava vit sama góða grundsjónarmið, tá tað snýr seg um viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum. Tað er rættast, at londini í felagsskapinum finna saman um størstu avbjóðingarnar, tí saman standa vit nógv sterkari.

Tí eru bert tvinnanda møguleikar á valinum tann 19. jan.: Sambandsflokkurin ella hinir fimm flokkarnir.

Vit virka fyri felagsskapinum - teir virka fyri at taka felagsskapin av.

Vit síggja fyrimunirnar í felagsskapinum - hinir síggja bert vansar.

Vit vita, at ríkisfelagsskapurin er at líta á við sínum møguleikum og samhaldsfesti. Hinir flokkarnir ásanna hetta bert, tá tað gongur minni væl, og brúk veruliga er fyri samhaldsfestinum í felagsskapinum.

Er nøkur skilagóð orsøk til, at vit t.d. skulu vraka útbúgvingarmøguleikar og møguleikar at søkja sær heilsubót gjøgnum Ríkisfelagsskapin? Skulu vit siga nei til ríkisveitingina, tá hon kemur væl við her í landinum? Skulu vit eisini skerja møguleikarnir hjá vinnuni at brúka vinnuligar skipanir og sendistovur í Ríkisfelagsskapinum? Skulu vit siga ja til afturgongd?

Nei, vit vilja halda fast við samstarvið í felagsskapinum.

Latið okkum halda okkum til leistin hjá Bill Clinton, sum er trendurin allastaðni í heiminum í dag. Samstarv og samband tvørtur um landamørk um tey týðandi málini.

Sambandsflokkurin er einasti garantur fyri felagsskapinum.